## Obama gevur inuittum vón

Fleiri minnilutar vænta sær ágóða av forsetaskiftinum í USA. Millum minnilutarnar, sum vænta sær nógv av Barrack Obama, eru inuittarnir í Kanada. Leiðari teirra, Mary Simon, sigur við KNR, at hon vónar, at Barrack Obama fer at skriva undir og staðfesta mannarættindalýsingina hjá ST um upprunafólk. Honb sigur seg eisini vóna, at Obama fer at leggja størri dent á tiltøk, sum skulu tálma avleiðingum av veðurlagsbroytingum, enn Bush-stjórnin gjørdi.



## Heðin og Marin Katrin stýra fíggjarnevndini

Fíggjarnevnd Tórshavnar býráðs hevur í dag haft fyrsta fundin, eftir at hon við ársbyrjan tók við. Fundurin staðfesti at Heðin Mortensen úr Javnaðarflokkinum verður formaður og Marin Katrina Frýdal úr Tjóðveldi verður næstforkvinna. Hinir nevndarlimirnir í fíggjarnevnd Tórshavnar býráðs hetta valskeiðið eru Jógvan Arge úr Tjóðveldi, Elin Lindenskov úr Javnaðrflokkinum og Sjúrður Olsen úr Fólkaflokkinum. Mynd: www.torshavn.fo



*Hanne-Vibeke Holst hevur leingi ynskt sær De Gyldne Laurbær. Her fær hon boðini frá formanninum í Boghandlerklubben, Anders Mejlbjerg.*

*(Thorkild Amdi / POLFOTO)*

# Endiliga kom viðurkenningin

**Metseljandi danski høvundin, Hanne-Vibeke Holst, fær í dag bókahandlara-prísin De Gyldne Laurbær. Men tað var ikki uttan bardaga**

BÓKMENTIR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Seinastu mongu árini hevur danski høvundin, Hanne-Vibeke Holst, verið ein av best umtóktu og seljandi donsku høvundunum.

Men hóast hon hevur skrivað metseljarabøkur øll vaksnaárini, skuldi hon blíva heili 50 ár, áðrenn bókahandlarnir untu henni hesa viðurkenning.

Mikil orðadráttur var í donskum miðlum herfyri, av einum hjartasuffi, ella ill-sinnisglepsi (tað veldst um móttakaran), frá Honnu-Vibeke Holst, har hon alment fanst at danska ummælaraskaranum og mentanarelituni.

Hon var stak ónøgd við, at hon ongantíð hevði fingið nakra bókmentavirðisløn, hóast hon, eftir hennara tykki, hevði uppiborið tað. Serliga fýltist hon á, at bókahandlarnir, sum hava forvunnið milliónir av krónur við søluni av bókum hennara, ikki virdu hana somikið, at hon var skikkað til viðurkenningina De Gyldne Laurbær.

Men nú eydnaðist tað loksins.

Og tí verður hátíðarlig handan av De Gylde Laurbær á skrivstovu høvundans mitt í Keypmannahavn seinnapartin í dag.

Nýggjasta útgávan hjá Honnu-Vibeke Holst, skaldsøgan Dronningeofret, er triði og seinasti partur í røðini um kvinnur í politikki. Hendan hevur longu selt omanfyri 100.000 eintøk.

Viðurkenningin er fyri bókarøðina Dronningeofret, Kronprinsessen og Kongemordet. Tað er Boghandlerklubben, sum letur De Gyldne Laurbær, aftaná atkvøðugreiðslu millum bókahandlarnar.

Saman við Leif Davidsen og Jane Aamund er Hanne-Vibeke Holst millum best umtóktu rithøvundunum í Danmark seinastu árini, skriva danskir miðlar.

# Løgtingið noktar at kanna almenn starvsfólk

**Ein meiriluti í Løgtinginum noktaði í morgun fyri at tað verður almannakunngjørt, hvussu nógva fráveru almennum starvsfólki hava vegna sjúku og skeið**

ALMENN STARVSFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki á hesum sinni, at almenningurin fær kunnleika til, hvussu ofta almenn starvsfólk hava verið burtur frá arbeiði hesi seinastu trý árini vegna sjúku, vegna skeið, ella vegna sjúk børn.

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, vakti ans, tá ið hann í Sosialinum fríggjadagin greiddi frá, at hann fór at reisa málið um fráveru hjá almennum starvsfólki

Í hesum sambandi ætlaði hann at seta Jóannesi Eidesgaard, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um hagtøl vóru um hesi viðurskifti.

Í morgun skuldi Løgtingið so atkvøða um, antin Jóannes Eidesgaard skuldi svara spurninginum ella ikki.

Andreas Petersen mælti løgtinginum frá at samtykkja, at spurningurin skuldi svarast, tí hetta var ein alt ov umfatandi spurningur at kanna hjá starvsfólkunum í fíggjarmálaráðnum.

### Skal ikki svarast

Og tað tók Løgtingið til eftirtektar, tí tá ið atkvøtt var, vóru 15 løgtingslimir ímóti, at spurningurin verður svaraður, fýra atkvøður vóru blankar og bara tvær vóru fyri, Kári P. Højgaard og Hergeir Nielsen.

Sostatt er greitt, at spurningurin verður ikki svaraður.

Kári P. Højgaard sigur í stuttari viðmerking, at hann tekur avgerðina til eftirtektar og ger ikki meiri við málið.

Men hann skilir ikki, at hetta skal vera so umfatandi, at tað ikki kann lata seg gera at svara spurninginum, tí antin eru hagtøl til skjals, ella eru tey ikki.

Hann heldur, at slík kunning er viðkomandi fyri starvsfólk á almennum stovnum, almenningin og politiska myndugleikan, tí úrslitið kann siga eitt sindur um, hvussu støðan er á almennum stovnum. Og vísa tølini, at fráveran er serliga stór, kann tað vera eitt tekin um, at arbeiðsumstøðurnar ikki eru nøktandi og so kundi politiski myndugleikin gjørt nakað við tað.

Til stuttleika kann nevnast, at av teimum 33 tinglimunum, vóru bara 21 á fundi í morgun.

Hvar hinir 13 løgtingslimirnir hava verið, er ikki gott at vita, men orsøkin til, at teir ikki vóru á fundi, var í hvussu so er ikki at teir vóru upptiknir á fundi í nakrari nevnd hjá Løgtinginum, tí tað vóru ongir nevndarfundir á skránni í morgun.

### Tríggir spurningar

Tað, sum Kári P. Højgaard vildi hava at vita, var um Jóannes Eidesgaard kann leggja hagtøl fyri Løgtingið, sum greina talið av sjúkradøgum, fráveru vegna sjúk børn og skeiðdagar hjá alment løntum starvsfólkum hesi seinastu trý árini og um talið er økt hetta tíðarskeið.

Hann vildi eisini hava at vita um sjónlig munur er í fráveru á teimum ymsu stovnunum og um nøkur tilsvarandi tøl eru fyri privata arbeiðsmarknaðin, sum tølini kunnu samanberast við.

- Men tá ið ein so stórur meirilutur í Løgtinginum ikki heldur, at hetta er viðkomandi, taki eg tað, til eftirtektar, sigur Kári P. Højgaard.

Hann ger ikki meiri við málið, tí hann leggur størri dent á uppskotið, hann hevur lagt fyri Løgtingið um at gera eina nøgdsemiskanning fyri at vita, hvussu nøgd fólk eru við tænastuna frá almennum stovnum.

Hann staðfestir, at tað er misskilt, tá ið summi hava lagt hetta fram sum um at hann hevur mist álitið á almennum starvsfólkið.

- Tey allarflestu gera uttan iva eitt gott arbeiðið, men tað er heldur ongin ivi um, at tænastan kann vera betri onkustaðni. Endamálið við hesum er ikki annað enn at fáa kortini á borðið fyri at vita, hvat vit tosa um, tí tað er fortreytin fyri at gera nakað við tað, sigur Kári P. Højgaard.

- Er nakað galið, er tað als ikki vist, at orsøkin er ódugnalig starvsfólk. Talan kann akkurát tað sama vera um manningartrot, vánaliga leiðslu ella skeivar mannagongdir, leggur hann afturat.

- Og tað er nakað, vit kunnu gera nakað við – men bara tá ið vit kenna veruligu støðuna.



*Løgtingið vil ikki, at Kári P. Højgaard og Føroya fólk skulu fáa at vita, hvussu stór fráveran er á almennum stovnum*